

# Methøgir fiskaprísir

Mánadagin í síðstu viku landaði Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík seks skip.

Partrolararnir, Navarin og Borgarin, sum eru fyrrverandi Polarhav og Stjørnan, høvdu sløk 200.000 pund tilsamans. Síðan høvdu línuskipini Klakkur, Núpur og Jákup B eini 60.000-70.000 pund hvør og Fiskimúli, sum eisini roynir við línu, hevði 31.000 pund.

Landingarformaðurin, Pól Fuglø, sigur, at meginparturin av veiðini hjá Navaranum og Borgaranum var upsi, meðan línuskipini høvdu tosk, h‡su, brosmu og longu – alt eftir, hvar tey høvdu roynt.

Klakkur, sum hevði roynt suður av Føroyabanka, Íslandsrygginum og eisini norðanfyri, seldi fyri umleið 17-18 krónur í miðal fyri kg. Núpur, sum royndi á Føroyabanka, seldi fyri góðar 20 krónur og Jákup B, sum bæði hevði verið á Íslandsrygginum og inni á landgrunninum, seldi eisini fyri góðar 20 krónur í miðal fyri kg.

Fiskimúli, sum er ein minni línubátur í mun til hinar tríggjar og hevði smærri fisk, seldi í miðal fyri góðar 15,50 krónur fyri kg.

Pól Fuglø sigur, at fiskaprísirnir á marknaðinum sum heild hava verið rættiliga góðir í seinastuni.

**-vilmund.**



*Við pallborið sótu f.v. Anna Hildur Hildibrandsdóttir umboðskona fyri Iceland Airwaves, John Best umboðsmaður hjá Sigur Rós, Nick Robins frá plátufelagnum BMI, Richard Laws tónleikasakførari við Statham Gill Davies, Christian Ulf Hansen umboðsmaður hjá Teiti og Sam Winwood varðaforseti fyri altjóða A&R hjá Kobalt Music Publishing*
*mynd: nud*

# Ferðakostnaðurin forðar fyri útflutninginum

**Við verandi prísi á ferðaseðlum mugu tónleikarar flyta av landinum skulu teir liva av tónleiki, og hetta kostar føroyska landskassanum skattapening.**

FUNKY FAROE ISLANDS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Prísurin á ferðaseðlum er størsta forðingin fyri menningini av føroyskum tónleika útflutningi. Tá flogfeløgini koma umborð kemur útflutningurin, hetta vóru greiðu boðini frá pallborðsluttakarunum á Funky Faroe Islands. Christian Ulf Hansen umboðsmaður hjá Teiti, vísti á, at t.d. fyri Teit, var eyka kostnaðurin av ferðaseðlum til Føroyar ein so stór útreiðsla , at tað var neyðugt, at Teitur búði uttanlands. Hetta merkir samstundis, at Føroyar missur allar skattainntøkurnar.

Christian gleddist um, at Faroe Jet var komið á marknaðin, tí hetta hevur fingið prísin eitt vet niður. Anna Hildur Hildibrandsson og John Best, sum í nógv ár hava fingist við íslendskan tónleik, vístu á, at í Íslandi hevði ferðaseðlaprísurin verið sera høgur, og tónleikarar, ið ferðaðust út at umboða Ísland, fingu fyrr eingi serlig tilboð. Men hetta var nú broytt, tí íslendsku flogfeløgini høvdu sæð, hvussu tónleikurin setti Ísland á heimskortið, og hvussu hetta vaks um áhugan hjá ferðafólki at koma til Íslands. Christian Ulf Hansen skeyt upp, at føroyski tónleikaídnaðurin tosaði við Faroe Jet um at fáa eina skipan í lag, har tónleikarar sluppu at flúgva bíligari, tí hetta hevði verið skilagott fyri báðar partar.

# Tvøramaður í høgum starvi hjá Bose



*Páll Olsen situr saman við Gissi Patursson, sum eigur nýggja Expert handilin. Páll situr høgrumegin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Bose er ein av heimsins størstu fyritøkum innan ljóðtøkni. Páll Olsen starvast í deildini í Danmark. Hann hevur búð leingi í Danmark og hevur ikki ætlanir um at flyta heimaftur, tí at starvið er sera gott. - Tó er møguleikin altíð opin, sigur hann**

VINNULÍV
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Páll Olsen av Tvøroyri er ein av leiðarunum í service support hjá stóra hátalaraframleiðarinum Bose.

Páll og konan hava búð í Danmark í 19 ár. Tey møttust niðri, tá ið hann las til elektro-teknikara, og tey vóru verandi í Danmark.

Páll er ættaður av Tvøroyri. Nú er hann í góðum starvi hjá stóru fyritøkuni Bose, sum framleiðir hátalarar og annað innan ljóðtøkni.

### Leiðandi innan ljóðtøkni

Bose er ein stór altjóða fyritøka, sum varð stovnað í USA. Teir hava eina deild í Danmark, sum umboðar norðanlond. Páll Olsen starvast í hesi deildini.

- Bose er heimsins størsti hátalaraframleiðari. Eg starvist í service support deildini. Mítt økið fevnir um Danmark, Føroyar og Grønland, sigur Páll.

Nýggi handilin í SMS Expert selur Bose hátalarar. Páll hevur júst verið í Føroyum og lagt teimum lag á, nú handilin skuldi opnast.

- Eg hjálpti til við uppsetingini av vørunum. Bose er eitt stórt eksklusivt merki, og vit seta krøv til handlarnar. Vit vilja fegin, at vøran verður sýnd væl fram í handlinum. Eg undirvísti eisini starvsfólkunum, soleiðis at tey hava eina vitan um vøruna hjá Bose, sigur hann.

Páll letur væl at nýggja Expert handlinum og starvsfólkunum.

- Expert handilin í SMS lúkur krøvini, sum vit seta. Teir hava alla vøruna frammi í handlinum, og sølufólkini kenna til vøruna. Eitt av starvsfólkunum kennir vøruna úr Danmark, har hann hevur starvast hjá einum handli, sum selur Bose, sigur Páll.

### 180 handlar í Evropa

Bose fer framvegis at fylgja upp uppá Expert í Føroyum. Teir síggja ein marknað í Føroyum, hóast tað búgva fá fólk á oyggjunum.

- Vit fara helst at koma 1-2 ferðir upp at leggja teimum lag á. Vit síggja møguleikar í Føroyum. Tað er ein marknaður allastaðni, so tað er heilt vist ein góður møguleiki Føroyum, hóast fólkatalið er lítið. Fólk keypa merkivøru, so tí vænta vit eisini, at tey fara at keypa okkara vøru. Bose selur í 180 handlum í Evropa. Harav eru nógvir Expert. Tá ið so teir sýndu áhuga fyri at hava okkara vøru í handlinum, vóru